# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Altjóða samstarv – ein avbjóðing

Føroyingar hava orð fyri at duga væl at venda sær í altjóða høpi. Sum siglandi fólk er stórur partur av fólkinum vanur við at vera uttanlanda og við at vera millum fremmand fólk og útlendingar. Hetta skuldi verið ein fyrimunur, nú altjóðaagerðin er yvir okkum. Føroyar eru partur av altjóðaagerðini uttan mun til, um vit ynskja tað ella ikki. Hetta er heilt einfalt ein gongd, sum lutvíst kemur av eini radikalt broyttari samskiftistøkni og lutvíst kemur av broyttum politiskum viðursliftum í heiminum. Eftir internetið og eftir fall múrsins verður heimurin ongantíð hin sami aftur.

Tað eru tveir at takla hesa støðu: Annar er at krógva seg og vóna, at alt bara verður, sumt tað altíð hevur verið. Hin er at taka ímóti avbjóðingini og smoyggja upp um armar. Tað er í okkara verð eingin ivi um, hvat rættast er. Tað er væl eisini soleiðis myndugleikarir hugsa, tá ið teir gera Hoyvikssáttmála, og tá ið teir royna at sleppa upp í EFTA og at fáa nærri samstarv og samband við ES, USA og Rusland.

Vit mugu halda uppat at ræðast Hoyvíksáttmálan (Íslandssáttmálan), vit mugu halda uppat at ræðast altjóða samstarv. Vit liva í einum heimi, sum byggir á kapping og samstarv. Tann sum krógvar seg verður at tapa – tann sum av fullum huga fer uppí og tekur kappingina upp, verður í longdini at vinna. Hetta er ein nýggj og trupul støða, men tað hjálpir ikki at gera sum strutsurin, at stinga høvdið í sandin. Tann tíð, har tú kanst verja títt vinnulív við protektionistiskum amboðum, er yvir og farin – hon kemur ikki aftur heldur. Vit, okkara vinna, okkara politiska skipan og samfelagið sum heild hava bert eitt í vali: at taka kappingin upp í altjóðagjørda umhvørvinum. Hetta setir stór krøv til førleikar, til hugflog, dirvi og áræði. Hetta setir eisini krøv til útbúgving av børnum, ungum og ikki minst teimum tilkomnu á arbeiðsmarknaðinum. Nú er útpurring!

**Sosialurin**



*Dómsnevndin: Toniah Pedersen, Niclas Bendixen og Kenneth Kreutzmann hugnaðu sær óført meðan Vígdis dansaði*

*Mynd: Kanal 5*

# Føroyska Vígdis átti mest sannførandi framførsluna

**Tá nýggja dansisendingin á Kanal 5 varð send fyrstu ferð í gjárkvøldið, var tað við føroyskari luttøku. Aigast má, at føroyska Vígdis Hentze Olsen kláraði seg stak væl, dómararnir kallaðu hennara framførslu tí mest sannførandi á degnum**

DANSUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrsta sendingin í røðini Kan Du Danse? varð send í gjárkvøldið á Kanal 5. Tey trý Toniah Pedersen, Niclas Bendixen og Kenneth Kreutzmann tóku ímóti dansiglaðum unglingum í fyrsta undanumfarinum, ið varð hildið í Amager Bio í Keypmannahavn. Hetta var fyrsta royndin at finna tey røttu til at kappast um heiðurin, besti dansari í Danmark, kr. 250.000 og møguleikan fyri yrkisleið sum dansari uttan fyri Danmark.

Nógvir dansarar, summir dugnaligir og aðrir minni dugnaligir royndu seg framman fyri dómsnevndini, við heimagjørdari koreografi og dansi til tónleik, ið tey sjálvi høvdu valt. Tá føroyska Vígdis Hentze Olsen koma á pallin framman fyri dómsnevndini, var týðiligt at síggja, at dómsnevndin hugnaði sær. Eftir framførsluna vóru tey fáorðaði, men orðini vóru stór, tey søgdu við hana, at hon var nógv tann mest sannførandi dansarin, ið tey høvdu sæð hendan dagin.

Vígdis slapp uttan trupulleikar gjøgnum nálareyga, og saman við 29 øðrum dansarum, var hon send á ein 4 dagars dansiverkstað, umframt hesi 30 sum komu víðari í fyrsta undanumfari, luttaka eisini tey, ið verða vald í út á hinum trimum undanumførunu á verkstaðin.. Har verða dansararnir vandir og royndir av nøkrum av bestu dansilærarunum og koreografunum innan nógvar ymiskar dansigreinir. Tá teir 4 dagarnir eru farnir, verða teir 8 dugnaligastu menninir og 8 tær dugnaligastu kvinnurnar valdar út, og hesi skulu luttaka í teimum sjey beinleiðis sendingunum fram ímóti endaligu kjósanini av endaliga vinnaranum.

Vígdis Hentze Olsen er ikki heilt óroynd sum dansari. Fyrr í summar hevði Dimmalætting viðtalu við Vígdis. Har bar m.a. til at lesa, at hon fór 15 ára gomul úr Føroyum fyri at royna at fáa gongd á eina yrkisleið sum dansari, eftir háskúla á Fjóni fór hon á grundútbúgving innan dans í Keypmannahavn, áðrenn leiðin gekk til Svøríki, har hon í juni í ár tók hon prógv sum yrkisdansari á Ballettakademinum í Göteborg. Umframt prógvi, var hennara avrik somikið gott, at hon varð vald ársins dansari á skúlanum.

Í løtuni býr Vígdis í Keypmannahavn. Luttøkan í Kan Du Danse? er ein stórur møguleiki hjá Vígdis, sum í samrøðuni við Dimmalætting, lýsti sína gleði um dansin á hendan hátt:

– Tað er heilt ótrúligt, hvussu nógv menniskjakroppurin kann úttrykkja og siga. Eg brenni fyri dansi og gevi alt eg eigi, tá eg eri á pallinum soleiðis, at áskoðararnir kunnu fáa mín boðskap at vita.

Fleiri føroyskar gentur hava luttikið í Kan Du Danse? kappingini í ár. Undanumførini vórðu filmaði í summar. M.a. hevði útvarpið herfyri samrøðu við Dianu, ið er kend úr dansibólkinum The Black & White Crew, hon hevði tá luttikið, ið einum undanumfari, ið tó ikki er sent enn.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.